# Truplar venjingarumstøður

**Klaksvíkar fimleikarafelag varð endurstovnað í 1998 og er í dag eitt sera virkið felag við umleið 250 limum. Hóast tað er felagið ikki serliga sjónligt uttan fyri Klaksvík, og er høvuðsorsøkin til hetta, at felagið ikki hevur nøktandi venjingarumstøður, sigur forkvinnan Katrin Jacobsen**

FIMLEIKUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Framtíðin hjá Klaksvíkar Fimleikarafelag er tryggjað, tá hugsað verður um talið á ungum og aktivum limum, men tvørrandi venjingarumstøðurnar hótta felagið kortini*

**Klaksvík:**
Katrin Jacobsen forkvinna í fimleikarafelagnum sigur, at venjingarumstøðurnar hjá felagnum eru als ikki nøktandi. Og er hetta høvuðsorsøkin til, at felagið ikki luttekur í kappingum.

– Liðini hjá okkum hava sera avmarkaða tíð til at venja í. Tey eldru liðini hava fingið hálvanannan tíma einaferð um vikuna í ár, meðan tey yngru hava ein tíma einaferð um vikuna, greiðir hon frá.

Hetta ger, at venjingarstøðið ikki kann fáast á eitt so høgt støði, at liðini kunnu luttaka í Grand Prix kappingum ella føroyameistarakappingini.

– Sum er nú, hava vit tosað um at fáa eitt lið við í onkra kapping møguliga komandi ár, men tað er treytað av, at tær fáa fleiri tímar, sigur Katrin Jacobsen.

Hon letur væl at undirtøkuni í felagnum – serliga millum genturnar – og heldur tað vera stórt spell, at felagið ikki kann fáa betri umstøður.

### Fimleikarahøllin upptikin

Báðar fimleikarahallirnar í Klaksvík eru sera nógv upptiknar. Katrin vísir á, at felagið nýtti sera nógva orku til at fáa tríggjar tímar eyka til hetta árið, og tað gongur út yvir annað virksemi í felagnum.

– Tað er avmarkað, hvussu nógva orku vit hava, og tá hon fyri tað mesta skal nýtast til at fáa fleiri tímar, so sigur tað seg sjálvt, at annað verður við sviðið soð, sigur hon.

Umframt fimleikarafelagið hava Mjølnir og Badmintonfelagið eisini tímar í fimleikararhøllini, og tí er støðan, sum hon er. Hølisviðurskiftini eru ein stórur trupulleiki, men nú er vón fyri framman. Badmintonfelagið og onnur við teimum eru farin í holt við eina verkætlan, har ætlanin er at byggja eina badmintonhøll. Um hendan verður veruleiki, dugir Katrin at síggja munandi batar á teirra umstøðum.

– Um ein nýggj høll kemur, rokna vit sjálvandi við, at hesin trupulleikin ikki verður so stórur longur, og at vit kundu fingið fleiri tímar í fimleikarahøllini, sigur hon.



*Serliga genturnar eru væl umboðaðar í felagnum. Verri stendur til í dreingjaliðunum. Men Katrin Jacobsen sigur, at hetta er ein trupulleiki hjá øllum feløgunum*

### Framsýning

Klaksvíkar Fimleikarafelag luttekur sum sagt ikki í nakrari kapping, men felagið hevur tó eina árliga framsýning í KÍ høllini, har øll liðini luttaka. Hetta er vorðið ein afturvendandi framsýning, og er eisini einasta "gularótin" til limirnar. Og tað ásannar Katrin er als ikki nóg mikið, um felagnum skal vera lívi laga.

– Vit mugu arbeiða fram ímóti at fáa lið í kappingar, og tað er eisini málið. Men vit kunnu ikki bara tveita ella noyða lið í kappingar, sum ikki kenna seg tilreiðar til tess, vegna væntandi venjijng, sigur hon.

Seinasta sunnudag var so árliga framsýningin hjá felagnum, sum eisini er endabresturin á árinum.

250 fimleikarar úr aldrinum 1. flokki til 10. flokk og eldri sýndu fram seriur og lop, sum tey hava vant, síðani tey byrjaðu í september í fjør.

KÍ høllin var stúgvandi full av fólki, ið hugdu at, meðan børn og ung vístu teirra kynstur. Fyri tey flestu mundi framsýningin verða væleydnað, og nógv av tí var flott at síggja, men tá felagið einans hevur eina framsýning um árið og hartil ikki luttekur í kappingum, er vónleyst at siga, hvørjum støði tey eru á í mun til onnur fimleikarafeløg í landinum.



*Dreingirnir vístu fram ymisk lop, sum teir hava vant dúgliga seinasta hálva árið*

# Jákup við í hópinum hjá OB í kvøld

**Fyri fyrstu ferð er Jákup á Borg við í hópinum hjá besta liðnum hjá OB, sum í kvøld skal spæla dyst í donsku steypakappingini móti Ølstykke**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í kvøld fær Jákup á Borg kanska møguleikan fyri at royna seg á besta liðnum hjá OB. Jákup og liðfelagar hansara skulu spæla dyst móti 1. deildarfelagnum Ølstykke í fimta umfari av donsku steypakappingini, tí sonevndu DONG-Cup.

### Skaðar kunnu slóða veg

Jákup á Borg sigur í telefonini úr Danmark, at teir báðir fremstu áleypararnir hjá OB, Steffen Højer og Mwape Miti, hava smærri snuddir at dragast við, og hetta hevur gjørt, at hann sjálvur hevur fingið boð um at koma við til Ølstykke.

OB og ikki minst venjarin, Troels Bech, hava góðar royndir í donsku steypakappingini. Undir leiðslu av júst Troels Bech vann OB fyri tveimum árum síðani donsku steypakappingina við einum 2-1 sigri á FC Keypmannahavn í finaluni. Í fjør tapti Trols Bech og táverandi felag hansara, FC Midtjylland, steypafinaluna móti Brøndby.

Um møguleikarnar fyri at sleppa at royna seg í kvøld, sigur Jákup á Borg, at teir eru rímuligir, men hann verður ikki vónbrotin, um hann ikki fær spælitíð.



# Kom, sá og sigraði

**Hann hevur verið favorittur í øllum kappingum, hann hevur luttikið í síðani 1985. Sama ár yvirtók hann plássið frá Anatoly Karpov sum heimsins sterkasti telvari. Talan er sjálvsagt um 40 ára gamla Garry Kasparov, sum sunnudagin vann enn eina kapping, hesaferð í Íslandi**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Íslendingar hava seinastu árini veruliga mannað seg upp. Fleiri sterkar altjóða kappingar um árið, eins og telvingin – eftir nøkur ár í dvala – er aftur vorðin meira útbreidd á oyggjuni. Sunnudagin varð tað greitt, at favoritturin Garry Kasparov vann sterku kvikkappingina, ið kallaðist Reykjavik Rapid 2004. Í finaluni ímóti Nigel Short vann hann við siffrunum 1,5 – 0,5. Talan var um eina knock-out kapping, við tveimum talvum í hvørjari uppgerð. 16 telvarar luttóku.

### Dygg mótstøða

Mæti telvarin hevði tó ikki lætt spæl. Í fyrsta umfarinum skuldi Kasparov hitta 13 ára gamla Magnus Carlsen úr Norra. Magnus er longu altjóða meistari, og manglar einans ein stórmeistaranorm, fyri at kalla seg stórmeistara!

Magnus hevði vinnandi fyrimun í fyrra talvinum, men Kasparov vildi ikki gevast so, og stríddi seg til ein javnleik. Talvið er við í blaðnum. Í seinna talvinum var Kasparov eiðasørur við hvíta fólkinum, og knústi Magnus í miðspælinum. Tó eitt ótrúliga gott úrslit hjá Magnus, sum verður spáddur eina framtíð í absoluttu heimselituni. Tannáringurin hevur longu væl yvir 2500 í rating.

Í fjórðingsfinaluni vann Kasparov trygt 1,5 - 0,5 móti hollendsku legenduni Jan Timman. Danin Peter Heine Nielsen gav Kasparov harða mótstøðu í hálvfinaluni. Bæði kviktalvini talvini endaðu við javnleiki, men í snartalvsumdystinum leikti danin skeivt í byrjanarspælinum, sum Kasparov við brestin revsaði.

Finalan fekk mong at minnast aftur á HM-dystin í London í 1993 millum Kasparov og Short, tá fyrrnevndi ruddiliga vann HM-heitið. Í Reykjavík broyttist einki; Kasparov vann 1,5 – 0,5.

### FM 2004 á Toftum

Føroyameistaraskapurin nærkast í hvørjum. Í skrivandi løtu hava yvir 30 telvarar boðað frá luttøku, harav serliga nógvir unglingar. Væntandi fer luttakaratalið eitt gott petti yvirum 50.

Enn er ov tíðliga at meta um kjansirnir hjá einstøkum, tá tekningarfreistin ikki er úti. Greitt er, at John Arni Nilssen, Heini Olsen, Flóvin Tór Næs, Ólavur Simonsen og Eyðun Nolsøe ikki kunna luttaka í ár. Hetta eru kendir og sterkir telvarar, ið tíverri ikki vera við.

Hinvegin koma menn í mans stað, og eitt nú fara vit at síggja verandi føroyameistara Martin Poulsen, Olaf Berg, Carl Eli N. Samuelsen, Hans Kristian Simonsen, Jens Kristian Hansen og Rani Nolsøe við talvborðini á Toftum um páskini. Ikki er greitt um John Rødgaard verður við. Toftamenn hava spílað seg út við sera góðum virðislønum til vinnararnar í øllum bólkunum.

Telvað verður í døgunum 3-10. apríl. Freistin at tekna seg er 27. mars. Ein kann tekna seg á www.faroechess.com ella við at seta seg í samband við Tofta Talvfelag.



# Talvið hesa vikuna

Carlsen, M (2484) — Kasparov, G (2831)
Rapid Reykjavik ISL 18.03.2004

1.d4 d5 2.c4 c6 3.Rif3 Rif6 4.Ric3 e6 5.Bg5 Ribd7 6.e3 Fa5 7.Rid2 Bb4 8.Fc2 0—0 9.Be2 e5 10.0—0 exd4 11.Rib3 Fb6 12.exd4 dxc4 13.Bxc4 a5 14.a4 Fc7 15.Rae1 h6 16.Bh4 Bd6 17.h3 Rib6 18.Bxf6 Rixc4 19.Rie4 Bh2+ 20.Kh1 Rid6 21.Kxh2 Rixe4+ 22.Be5 Rid6 23.Fc5 Rd8



Støðumynd eftir 23_Rd8

24.d5 Fd7 25.Rid4 Rif5 26.dxc6 bxc6 27.Rixc6 Re8 28.Rd1 Fe6 29.Rfe1 Bb7 30.Rid4 Rixd4 31.Fxd4 Fg6 32.Fg4 Fxg4 33.hxg4 Bc6 34.b3 f6 35.Bc3 Rxe1 36.Rxe1 Bd5 37.Rb1 Kf7 38.Kg3 Rb8 39.b4 axb4 40.Bxb4 Bc4 41.a5 Ba6 42.f3 Kg6 43.Kf4 h5 44.gxh5+ Kxh5 45.Rh1+ Kg6 46.Bc5 Rb2 47.Kg3 Ra2 48.Bb6 Kf7 49.Rc1 g5 50.Rc7+ Kg6 51.Rc6 Bf1 52.Bf2 remis

# FM í Boccia verður leygardagin

Komandi leygardagin verður føroyameistarkappingin í Boccia í Gundadalshøllini í Havn. Kappingin byrjar leygarmorgunin klokkan tíggju og kappast verður í trimum deildum. Ein kapping er fyri rørslutarnað børn, ein onnur fyri rørslutarnað vaksin, meðan tann triðja er fyri menningartarnað.

Sum nakað nýtt fer kappingin ár eisini at umfata eina várkapping. Hendan kappingin verður í tveimum deildum, ein fyri sysktin og hin fyri pensionistar.

**tn**



*Hendan myndin er av nøkrum av heiðursmerkjavinnarunum, tá ið FM í Boccia var hildið í Klaksvík í fjør*
*Mynd: Solby A. Eliasen*

# FM Finala í Bridge

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 27. mars verður finalan fyri pør í bridge leikt. Spælt verður í Bridgehúsinum í Havn. 20 pør hava onga sær rættin at luttaka í finaluni. Byrjað verður kl: 10:00, spæld verða 76 spøl.

Tey 20 luttakandi pørini:
Magni Jøkladal – Allan Dal-Christiansen
Jógvan H. Andreasen – A. G. Nielsen
Salomon Johansen – Zakaris Joensen
Ingibjørg Hansen – Henriette Svenstrup
Kaj Alstrup – Høgni Hansen
Dia Petersen – Hans Egil Joensen
Eydun Jensen – Niels Nielsen
Høgni Jacobsen – Finn Ougaard
Eydun Joensen – Helgi Joensen
Eilif Petersen – Petur A. Johannesen
Dia Jacobsen – Marner Joensen
Per Kallsberg – Dánjal P. Mohr
Høgni Vesturklett – Gunnar Mouritsen
Johannes Skaarup – Jórun Johannesen
Petur S. Rasmussen – Hannis Jacobsen
Eydun Jacobsen – Pól Joensen
Reimund Langgaard – Vilhelm Nygaard
Jóannes Mouritsen – Heðin Mouritsen
Rói Joensen – Jógvan Juul Rasmussen

### Steypakappingin

Á nevndarfundi hjá Føroya Bridgesambandi herfyri, varð avgjørt at broyta verandi steypakappingarhátt. Tað verður tí ikki soleiðis, at bert ein dystur verður til liðini, ið tapa fyrsta dystin. Kappingin verður løgd soleiðis tilrættis, at øll spæla so nógv sum møguligt. Sjálv finalan verður leygarkvøldið, og hon verður (sjálvsagt) bert millum tvey lið, men fyri tey, sum heldur vilja spæla bridge enn at verða áskoðarar, verður skipað fyri serstakari kapping. Kostnaður fyri hvønn leikari er 900 kr. Incl. Gisting, mat og luttøku.

Steypakappingin verður spæld á Hotel Vágum í døgunum 7. – 9. mai. Vinningurin er ferðaseðil til bridgekapping í einum av grannalondunum.

Tilmelding innan 30. mars hjá kappingarleiðaranum.

## Spæl

Her skulu vit síggja eitt spæl har Jens Pauli Nolsøe og Jákup Hjaltalin, ið báðir leika á 1. deildarliðinum hjá HH-Bókhald, sum gjørdist nr. 4 hetta kappingarárið, melda ein sera flottan 7hj.

SP 52
HJ K109876
RU 875
KL 82

SP EKD1063
HJ EDB
RU 2
KL ED7

N - S
2hj 4nt
5kl 7hj

Norðan valdi at opnað við 2hj, ið er eitt veikt meld við 6 hjartarum. Nú meldaði sunnan 4nt, sum spyr eftir essum og evt. trumf damu. Norðan svarar 5kl, vísandi 1 ella 4 ess. Suður meldar síðani tann upplagda 7hj !! Um norðan ikki opnar við 2hj, verður tað nærum ógjørligt at koma í 7hj.